Røða forseta Íslands,
Ólafs Ragnars Grímssonar,
hildin í morgunmatarveitslu Føroya Løgtings
28. juni 2001

Harra løgtingsformaður
Løgmaður
Góðu gestir

Íslendingar hava altíð havt stóra virðing fyri Føroya Løgtingi, og eg takki fyri tann heiður og tað gestablídni, ið Løgtingið vísir mær og Íslendingum í dag.

Íslendska Alþingið og Føroya Løgting eru runnin av somu rót. Landnámssøgan og 1000 ára gamal hugur frælsa menniskjans at skipa samfelagið við rættvísi og samanhaldi er stavnhald okkara. Henda forna ábending hevur fylgt okkum á langari leið, og tjóðir okkara kunnu við stoltleika vísa á egnu søgu, tá ið vit bæði nú og í tíðini, sum kemur, líta á samstarvið okkara millum.

Føroya Løgting og íslendska Alþingið hava gingið á odda í útnorðursamstarvinum. Føroyskir, íslendskir og grønlendskir tingmenn hava við regluligum fundarvirksemi víst greiðan samstarvsvilja, teir hava tikið stig til ábøtur, gjørt framstig og ruddað slóð.

Fólkaræði er siðvenja í samfeløgum okkara, og hetta endurspeglast týðiliga í teirri sannroynd, at júst fólkavaldu tingini settu skjøtil á eina búningarleið, ið knýtir okkum tættari saman. Víða um í heiminum skipar embættismannaveldið fyri tílíkum samskiftum. Hjá okkum, íslendingum og føroyingum, eru tað tingini bæði, ið eru tann berandi samstarvsmegin.

Í huga íslendinga eru føroyingar frændur og vinir, og bondini okkara millum eru tættari og sterkari enn bond við aðrar tjóðir. Søgan og mentanin standa sum ein varði um megi okkara, endurnýggja støðugt ta menniskjansligu orkuna, og mál okkara, tað føroyska og hitt íslendska, eru tættari skyld hvørt við annað enn flest onnur mál. Føroyar eru helst einasta land í verðini, har íslendingar ikki meta seg sjálvar sum útlendingar, men kenna á sær, at her hoyra teir heima.

Íslendingar hava eisini roynt at víst á ítøkiligan hátt, at vit virðismeta hetta vinalagið. Hetta kemur til sjóndar, tá ið fiskiveiðurættindi verða tilllutað í havinum kring Ísland, vit lata burturav dýrabarastu ogn okkara til føroyskar sjómenn, og hetta endurspeglar fyrst og fremst tað vinarlag, ið er okkara millum.

Vit virðismeta høgt ta hjálp og tað vinarlag, ið føroyingar hava víst, tá ið á stendur. Samhugurin og stuðulin, ið føroyingar vístu íslendingum, tá ið skalvalopini vóru á Vestfjørðunum fyri fáum árum síðani, verða ikki gloymd.

Í vinalagnum, siðaarvinum og felags áhugamálum eiga vit dýrabarar eginleikar, sum til ber at gagnnýta, tá ið krøv verða sett til økt samstarv millum tjóðir í útnorðri.

Tingini í Føroyum, Íslandi og Grønlandi hava longu góðar royndir av samstarvi sínámillum og teir sum standa á odda fyri tí útinnandi valdinum eru við at fáa regluligt samráð í lag.

Vert er at geva gætur, at ríkini á eysturstrond Kanada hyggja meira og meira í ein eystan, og tað nýstovnaða skotska tingið hevur lyndi til at leita vestureftir.

Heimurin hevur verið fyri veruligum broytingum tey seinastu árini, og hetta ger tørvin á samstarvi í Norðurhøvum enn størri. Her hava tjóðir okkara av sonnum felags áhugamál, og royndir okkara og samráð kunnu vera dyggur stuðul fyri aðrar Norðurtjóðir.

Økið frá eysturstrond Kanada til Grønlands og yvir um Atlantshavið til Íslands og Føroya og víðari til Skotlands og Norður-Noregs, Svøríkis og Finnlands heilt yvir at Vestur-Russlandi hevur fingið nýggjan leiklut, og tað er týdningarmikið, at vit gagnnýta teir møguleikar, ið standast av hesum.

Eg veit, at Føroya Løgting fylgir gjølla við í teimum avbjóðingum, ið tann nýggja heimsmyndin skapar, og íslendingar ynskja inniliga at standa við tykkara lið sum brøðratjóð á hesum nýggja leikpallinum.

Eg ynski Føroya Løgtingi alt tað besta á lívsins vandaferð og biði øll reisast og hevja gløs tykkara Føroya Løgtingi til heiðurs.